— Tá eg greiddi børnunum frá, at tað hevur týdning at onkur stríðist fyri at geva arbeiðarum betri sømdir skiltu tey tað. Eisini greiddi eg teimum frá, at hetta var arbeiði, har ein kundi koma at standa fyri skoti.

— Tað er greitt, at børnini ikki skiltu ljótu viðferðina, sum eitt serligt blað gav mær, og tey spurdu eisini, um tað var rætt? — Eg svaraði, at tey skuldu vita, at tað var neyðugt!

— Tíbetur er tað soleiðis heima hjá okkum, at børnini liva við í arbeiði mínum og hava áhuga fyri fakfelagsmálum. Tey búnast eisini og fáa skil fyri, hvat er rætt og skeivt.

Hvussu kendi tú tað persónliga?

— Eg kendi meg vónsviknan, — tað dylji eg ikki. Eg hevði verið við til at byggja felagið upp, og tað var svárt, at nevndin soleiðis stakk knívin í ryggin á mær. Hevði eg væntað hetta, so hevði tað ikki verið so torført at liva við…

Ingeborg Vinther kom styrkt burturúr merkjastríðinum.

— Við hesum málinum kendi hon rættuliga, hvussu stór arbeiðarafjøldin var, sum stóð aftanfyri hana. — Hóast ógvusligu persónligu álopini, so vóru júst hesi við til at sýna henni, hvar styrkin lá, — og hon ikki var at finna hjá teimum fáu, sum stóðu saman um part í Fjallbrúður.

Tær standa nú einsamallar.

Søgan

Aðalfundurin 1982 í FA álegði nevndini at fáa merkjamálið viðgjørt og loyst. Tað byrjaði í Fuglafirði, har kvinnur noktaðu at brúka merkju. Tær vóru koyrdar til hús.

FA kom upp í og stuðlaðu kvinnurnar. Ósemjan endaði við, at merkini bert skuldi nýtast av teimum, sum vildu tað sjálvar.

Á fundi í november 1983, varð aftur viðtikið, at loysa merkjamálið, og fáa skrásetingina burtur, har vanlig tímaløn var nýtt.

FA kallaði tá saman til umboðsmannafund, har álitisfólk og nevndarlimir frá øllum flakavirkjum í Føroyum vóru við.

— Eingin mótmælti hesi samtykt, — heldur ikki Fjallbrúður, sum hevði tvey umboð á fundinum.

Úrslitið kom aftaná, ein sonn øsing móti mær persónliga.

Tann 7. januar 1984 sótu vit við døgurðaborðið, tá Útvarpið læs kunngerðirnar. Henda dagin kl. fýra seinnapartin, hevði eg kallað inn til nevndarfund.

Útvarpið kom við kunngerð um eykaaðalfund frá Fjallbrúður, sum ein meirluti í nevndini kravdi. Felagið skuldi viðgerða: — misálitisváttan av formanninum!

— Eg noyðist at viðganga, at eg fekk eitt sjokk, tí eg visti ikki av nøkrum. Eg kendi tað sum hevði eg tikið av kassanum, ella gjørt okkurt ólógligt.

Eingin munur

Heldur tú, at tað hevði týdning, at tú var kvinna. — Eg meini, hevði ein maður fingið slíka viðferð.

— Tað veit eg ikki. Sjálv skilji eg ikki millum mannfólk og konufólk í arbeiði, — eitt nú fáa tey somu løn í dag, so har haldi eg ikki, at vansin er.

Hvørji ráð hevur tú til kvinnur í leiðandi støvum?

— Ein kvinna má ongantíð halda, at menn skulu hjálpa teimum í leiðandi støvum, — bara tí tær eru kvinnur.

Kvinnur skulu sjálvar arbeiða seg fram. Tær skulu vita, at tær eru eins dugnaligar, sum menn. Tær skulu koma fram við egnu sjónarmiðum og ikki nýta uppskriftina hjá monnum!

0 Fyri meg hevur tað altíð verið eyðsæð, at kvinnur eru sjálvstøðugar verur — skilji ikki munin. Ið hvussu so er, havi eg altíð arbeitt javnstøðugt.

— Í fyrstuni skilti eg kanska, at onnur hildu tað vera løgið, at eg var formaður í FA, — bæði menn og kvinnur hildu tað vera óhóskandi.

Ingeborg Vinther hevur tey evni, at taka spurningar upp til viðgerðar, so hvørt sum teir stinga seg upp. Eru trupulleikar, sigur hon, at hon tekur tað til eftirtektar beinanvegin, — og skúgvar teir síðan til viks.

— Eg kenni, at uppgávan hjá mær innan FA er ein stór ábyrgd og at eg skal gera tað eftir besta førimuni.

— Eg tími ikki at fáast við tað, sum er negativt og einkisigandi fyri heildina. Lat tað fara!

Hvussu kennist tað sum mamma og kona, at hava so týðandi arbeiði?

— Mítt arbeiði hevur við sær, at eg eri nógv heimanífrá.

Tað kann ikki sammetast við eitt átta tímars arbeiði.

Eg skal altíð vera til reiðar at fara út í lokalfeløgini at tosa við limirnir og geva teimum svar upp á ivaspurningar. Telefonin er eisini uppfunnin, og tað merkist væl í gerandisdegnum og í fritíðini.

— Við síðuna av fakfelagsspurningum, fyrisiting og samráðingararbeiðnum, so er eisini mín uppgáva at ferðast nógv uttanlanda. Tað er ein týðandi partur, at eg kann umboða FA. Vit tosa um samfelagsspurningar og fakfelagsmál. Á henda hátt fái eg eisini innlit í, hvussu grannalond okkara arbeiða við slíkum spurningum. Hetta er lærurikt, — eisini tí eg fái samband við fakfelagsfólk í hinum Norðurlondum.

Samvitskubit

— Sjálvsagt kenni eg tað, sum einhvør onnur mamma og kona vildi kent, at eg havi samvitskubit av, at ferðast so nógv burtur heimanífrá.

— Her noyðist eg at viðgang, at vit heima hjá okkum hava eitt óvanliga stórt samanhald, tí familjan sum heild stuðlar meg í mínum starvi. Tað er mín styrki; at eg ikki nýtist at hava ampa av mínum heima. Børnini hava altíð onkran at fara til. Omman býr í grannahúsinum og hon er altíð til reiðar at taka móti ommubørnunum, eins og eg havi onnur í familjuni, sum eru góð við tey.

— Vit kunnu eisini seta tað umvent upp. Hevði tað verið pápin, sum fór avstað, so hevði tað ikki verið óvanligt.

Hjá okkum er tað bert natúrligt, at tað eri eg sum fari avstað. Pápin er heima hjá børnunum.

Eg kann eisini siga, at vit øll eru ment og búnað av hesum, sum eg fáist við. Tað er vorið ein natúrlig gongd í gerandisdegnum.

— Eg fari norður til Havnar hvønn mánamorgun, sum so mangur annar, her suðuri, sigur Ingeborg Vinther.

Tú ert 40 ára gomul og hevur júst tikið við í FA, eitt 2 ára skeið afturat. Hvat er aðalmál títt innan FA?

— Tað er m.a. at fáa Upplýsingarfelagsskapin Verkamanna at virka. Í dag eru átta feløg uttanfyri FA, sum eru limir. Hetta hevur at týða, at vit kunnu fara undir regluligt upplýsingararbeiði fyri limir í arbeiðsrørsluni. Hetta er ein týðandi táttur fyri arbeiðarnar, at teir kunnu fáa upplýsing og frálæru í teirra egna umhvørvi.

Onnur aðaluppgáva er sum heild at betra um viðurskiftini hjá lágløntum og veikum í samfelagnum. Tað gerst eisini m.a. við at upplýsa um tey krøv og rættindi, sum hesi sjálvsagt eiga í okkara landi.

Høvuðsuppgávan er sjálvsagt eisini at savna saman arbeiðarafjøldina og verja teirra áhugamál. Hetta verður gjørt við at fylgja við í tí sum fyriferst í samfelagnum, — ikki bert innan fakfelagsarbeiðið, — bæði politiskt og samfelagsliga.

Tað hevur við sær, at eg lesi øll bløðini, — uttan mun til politiskan lit, lurti eftir, hvat fer fram á Tingi o.s.fr.

Síðan skal eg taka støðu til tey mál, sum feløgini leggja fram í FA. Eg havi skyldu at hjálpa fakfeløgunum við trupulleikum á arbeiðsplássunum og fáa greiði á ósemjum, ivamálum o.ø.

— Sum tú sært, so er torført hjá mær at halda átta tímars regluna, sigur Ingeborg Vinther og brosar.

Í kvøld kl. 12 er sáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag úti og nýggjar samráðingar eru í gongd.

Ingeborg Vinther fer treystliga til verka. Hon var einmælt vald at átaka sær samráðingarstarvið fyri 7.500 fólk í Føroyum.

— Tað tímir hon at fáast við…!

Dagny

Tveir nýggir í nevndina

Aðalfundurin í Føroya Arbeiðarafelag friggjadagin og leygardagin valdi tveir nýggjar menn í nevndina í felagnum. Teir eru Torleif Augustinussen í Vági og Elias Hansen á Skála. Úr nevndini fóru Óla Christian Olsen og Karl Robert Johannesen, ið ikki stillaðu upp aftur. Ingeborg Vinther, ið eisini stóð fyri vali, varð afturvald. Og hon varð eisini einmælt afturvald til formann í felagnum.

Á fundinum var orðaskifti um uppskotini til nýggjan sáttmála, og fundurin samtykti eina rammulóg fyri lokalfeløgini.

Friggjakvøldið var samkoma, har Jóngerð Purkhús greiddi frá búskapi og teimum nýggju avskrivingarreglunum. Á samkomuni var eisini Sigurd Joensen, sum felagið takkaði fyri trúgva tænastu sum sakførari felagsins, samstundis sum teir nýggju sakførararnir Trúgvi Jacobsen og Páll Nielsen vórðu ynsktir væl komnir í arbeiðið.

randi

1. mai í morgin

Altjóða arbeiðaradagurin verður hildin ymsa staðni um alt landið

Eins og undanfarnu ár verður 1. maidagshald ymsa staðni í landinum. Í Sørvági, Klaksvík og Vági, har tey áður hava hildið dagin, verður tó einki í ár.

Í Havn

1. maidagshaldið, sum Havnar Arbeiðamannafelag skipar fyri, byrjar kl. 15 við Tinghúsið. Røðararnir verða Karl Johansen, Harriet Nybo, Jóanes Nielsen, Tórfinn Smith og Andreas Debes.

Á Tvøroyri

Arbeiðsmannafelagið Fylking, Fiskepigernes Fagforening og Arbeiðskvinnufelagið Drósan skipa fyri haldinum á Tvøroyri. Røðarar verða Ingeborg Vinther, Sverri Midjord og John Mortensen.

Í Fuglafirði

Arbeiðskvinnufelagið, arbeiðsmannafelagið og handverkarafelagið skipa, sum tey plaga, fyri haldinum í Fuglafirði í morgin. Hornorkestrið spælir, og røðararnir verða Tummas Arabo, Hjalmar Joensen og Signar Hansen.

Ein 1. mai dags heilsan til allar javnaðarbrøður og -systrar um allan heim, ið berjast fyri veruligum javnrætti…

Lag: Sådan er Kapitalismen

Fyrsta maidags rósan blómar
hátt mót himni — føgur reyð.
Hon sum ongar aðrar blómur
litar heimin — Guð svá beyð:

Niðurlag:
Reinsið Templið — pengaveldið —
víki fyri alheims girnd.
»Verkafólk« í øllum aldri
hátt tit hevjið brand mót »synd«.

Hendan rósan boðskap hevur
til øll tey, ið hjarta reyð,
berjast við teim rættvís' andum
Loysa leinkjur — fólk úr neyð.

Ongantíð á jarðarríki
rósan stríðsfús — sum í dag:
Vaknið, stríðist, fylkist saman
móti trælaoksins lag.

Sólmundur